Tað verður hervið gjørt kunnugt, at kæra mamma okkara

**Estrid Krossteig**
**ættað av Økrum**
**búsitandi í Havn**

andaðist mikudagin 4. mai 2011, 93 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju sunnudagin 8. mai klokkan 14.

***Fyri tey avvarðandi***
**Maria, Elsa, Ólavur Jákup, Hergerð og Ása**



## TØKK

Hjartaliga ttakka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma, langomma og systir

**Arna Dam**
**Húsavík**

andaðist og varð jarðað.

Takk til prest fyri væl vald orð.
Takk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Takk til Sannu, Ragnaheiður og Tórmóð fyri góðan sang.
Ein serlig takk til Gnippu og Pola fyri góða hjálp. Turid fyri títt trúfesti.
Somuleiðis stór takk til tykkum øll, sum so trúliga ringdu, skrivaðu og komu inn á gólvið at vitja hana meðan hon var sjúk.
Serstøk takk til heimasjúkrasystrarnar fyri góða hjálp.
Takk til tykkum, ið á einhvønn hátt hjálptu so væl við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til missiónshúsið í Skopun.
Hjartans takk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

***Vegna tey avvarðandi***
**Jógvan, Eyðvør og Eyðfinnur**

# Kjak



**Jógvan Arge**
*formaður í mentamálanevndini í Havn*

## Skeri eg teg her, so missi eg teg har

Øgiligt hurlumhey, ið stóðst av staðseting av einum fótbóltsvølli.

Tað stutta av tí langa er, at í býarætlanini er pláss lagt av til ein fótbóltsvøll við Skúlan við Løgmannabreyt.

Enn hava ongar ítøki-ligar ætlanir verið um at gera vøllin, men trýstið á vøllirnar í Gundadali og á Argjum verður alsamt størri, og tað aktualiserar spurningin um fleiri møguleikar.

Her kemur staðsetingin av vøllinum í Hoyvíkshaga til orðaskiftis. Summi halda, at ov vindhart og trongt er har, sum øki er lagt av, og víst verður á annað øki í Dalinum Langa niðan frá Hoyvíkar skúla.

Tann staðsetingin er heldur ikki uttan ivamál, tí tað økið er lagt sum ein grønur geiri eystanfyri seinastu útstykkingarnar í Hoyvíkshaga.

Grønu og óbygdu geirarnir úr Sandá í suðri til Dalin langa og Langadal í eystri eru í býarætlanini mettir umráðandi fyri fólksins trivnað og vælveru.

So støðan í hesum málinum kann, hvussu tú vendir tí, leggjast út sum í orðatakinum: Skeri eg teg her, so missi eg teg har.

Kanska hevur málið ikki sama skund, sum býráðslimir hava havt at skriva seinastu dagarnar.

Um ikki so langa tíð verður graslíki lagt á Tórsvøll. Tað merkir, at í Gundadali verða nógv fleiri vallartímar tøkir til feløgini, sum halda til har.

Kortini skerst ikki burtur, at bæði býarskipanarliga, trivnaðarliga og ítróttaliga er tað uttan iva skilagott í framtíðini at gera ein fótbóltsvøll í Hoyvík.

Sum er hevur høvuðsstaðurin nógv minni vallarkapasitet enn flestu bygdir, ið luttaka í fótbóltskappingunum.

Fylgja vit ikki nøkurlunda við her, kann tað skjótt elva til, at fótbóltsmenningin í Havnar kommunu steðgar.

Tað vil ongin hava sitandi á sær.

---



**Jenis av Rana,**
*Løgtingslimur*

## Flott mynd, men ivasom tíðindir

*... ein viðmerking til gomul tíðindir í Sosialinum*

Út móti midnátt, týskvøldið h. 1. februar, sendi eg fjølmiðlum, portalum o.ø. grein, har eg greiddi frá arbeiðinum í stjórnarskipanarnevndini tey 10 ½ árini, eg var virkin har. M.a. skrivaði eg hetta brotið:

"Eg mynstraði av eftir 10 ½ ára starvstíð.

*... eftir innanhýsis stríð var arbeiðssjakkið umskipað og nýggjur formaður valdur í oktobur sama ár. Sama dagin fekk eg loyvi frá feløgum mínum, sum tann, ið longst hevði verið við í arbeiðinum, at leggja amboðini úr hondum. Hetta var 21. oktobur 2010, eftir 10 og eitt hálvt ( 10 ½ ) ára starvstíð. "*

Fáar dagar áðrenn hesa grein, sum øll høvdu høvið at lesa í ymiskum fjølmiðlum, varð eg av sjónvarpinum spurdur um hetta sama, og har fekk eg høvið at greiða frá, hví eg hevði valt at frávelja fundarvirksemi í stjórnarskipanarnevndini. Síðani tá havi eg møtt mongum, sum meta meg hava hava víst ómetaligt tol øll hesi árini, har eitt løgtingsumboð fyri og annað eftir løgdu árar inn og fingu onnur at taka yvir arbeiði sítt í hesari maratonnevnd.

### Tilvitað gloymska á Sosialinum?

Løgið at ongin á Sosialinum hevur varnast fráboðan mína- hvørki í sjónvarpinum, í bløðum ella á portalum. Man tað verða tilvitað, so høvið nú býðst at bera hálvan sannleika um, at " Jenis skulkar hvønn fund ". Fundir, sum eg greitt og í góðari tíð boðaði frá, at eg ikki komi at luttaka á?

Tey, sum verða boðsend at møta í rættinum vita, at tey mugu siga sannleikan, allan sannleikan og bara sannleikan. Kanska kundi sosialurin umhugsa hesa meginreglu næstu ferð trongd kemur á " at sparka mannin ".